


www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 01 - 2012

# Valiant Petroleum fyristøðufelag í Norra

Bretska oljufelagið Valiant Petroleum, sum í fjør keypti upp norska oljufelagið Sagex, og harvið fekk ein týðandi leiklut í oljuleitingini við Føroyar, hevur nú fingið fótin fyri seg á norska landgrunninum. Tað hevur fingið tillutað eitt leitiloyvi sum fyristøðufelag á norskum øki, og tað er fyrstu ferð, at tað fær henda leiklut. Valiant er so eisini partur av leitingini á føroyska landgrunninum og hevur trý leitiloyvi her, og har tað so er fyristøðufelag í øllum loyvunum. Í einum av loyvunum er Atlantic Petroleum partnari. Fyrr umsat Sagex hesi loyvi, men nú er tað so vorðið uppkeypt av Valiant Petroleum. Ein gamal kenningur fylgdi tó við í keypinum, og tað er Terje Hagevang, sum í síni tíð var sera virkin í leitingini í Føroyum. Fyrst sum stjóri í Saga Petroleum og seinni sum stjóri fyri Sagex. Terje Hagevang er settur sum stjóri hjá felagnum í Noregi umframt at hava ábyrgdina av leiting og verður tað tí hann, sum í framtíðini fer at taka sær av føroysku loyvunum hjá felagnum. Vit eru sera fegnir um at hava fingið eitt leitiloyvi sum fyristøðufelag í Noregi einans seks mánaðir eftir, at vit keyptu upp Sagex og harvið gjørdust partur av norsku leitingini, sigur ovasti stjórin í Valiant Petroleum Peter Buchanan. Tað er Terji Hagevang, stjóri í norska partinum av felagnum, sum hevur staðið fyri umsóknini. Hann hevur 30 ára royndir innan økið stendur at lesa á heimasíðuni hjá Valiant. Tað var annars sera stór kapping um loyvini í norsku útbjóðingini. Føroyska oljufelagið Faroe Petroleum fekk sjey loyvi harav trý sum fyristøðufelag.